# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum gjørdu okkum silvurbrúdleypsdagin 4. juli ógloymandi.

**Heilsan**
**Edith og Fredag**

### 70 ára føðingardagur

Mikudagin 3. aug verður Ámundur Berthelsen, Strendur 70 ár. Dagurin verður hildin í Missiónshúsinum frá kl 19:00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Dagurin

**3. august. Nikodemus.** Dagurin verður hildin til minnis um farisearan, sum kom til Jesus á náttartíð (Jóhs. 3, 1-21). Halgisøgur siga, at eftir deyða Jesu varð Nikodemus kristnaður og doyptur av ápostlunum Pæturi og Jóhannesi.

Grikst navn, ið merkir *sigur yvir fólkinum.*

Dagurin verður eisini róptur *ólavsøka síðara,* til minnis um, at bein Ólavs vórðu flutt í kirkjuna og løgd í skrín. 3. august í 1030 varð hann lýstur at vera *heilagur maður.*

# Kristoffur Klakkstein á 70 ár

## Ein heilsan til Kristoffur Klakkstein á 70 ára føðingardegnum



Mánadagin 1. august fylti Kristoffur Klakkstein í Klaksvík 70 ár.

Tíðin rennur sum streymur í á, og ein persónur, sum eg seti ógvuliga høgt, er vorðin 70 ár. Mær er sagt, at hann er næstyngstur av 5 systkjum, og at hann er av raskastu monnum bæði á sjógvi og landi; men í hugaheimi mínum er hann bara abbi á Brekku, hóast hann ikki er veruligi abbi mín.

Frá tí eg kann minnast, eri eg komin í heimið hjá Petru og Kristoffur, og altíð hava tey verið líka góð við meg. Hvar hann fór, um tað so var í egningarskúrin ella á fótbóltsvøllin, hevði hann meg við sær, og altíð hevur hann víst sera stóran áhuga fyri tí, sum eg havi tikist við.

Við hesum fáu orðum fari eg at takka tykkum fyri alt, sum tit hava verið fyri meg.

***

Hjartaliga tillukku á 70 ára degnum, og Harrin signi teg ríkliga og gevi tær mong góð ár afturat.

**Rógvi**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Jacobina Heinesen**
Norðragøta

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til heimahjálpir og røktarfólk.
Tøkk til øll tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*
**Magnus, Ása, Jón, Sólvá, Herborg, Anna og Ingolf**

## Tøkk

Vit takka inniliga fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri maður mín, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Poul Klein Johannesen**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum, sum vóru um okkum í Danmark og til tykkum, sum her heima løgdu alt til rættis.
Tøkk fyri friðarløtuna í kirkjuni kvøldið fyri jarðarferðina.
Tøkk fyri stuðul til kirkjuna, blómur og kransar og tøkk til tykkum øll, ið fylgdu honum til hvíldar.

*Fyri tey avvarðandi*
**Elsa**

# Meinhard og Fríðunn giftust leygardagin



**Eini 300-350 fólk vóru á brúdleypsveitslu á Hotel Føroyum, tá ið Meinhard Jacobsen og Fríðunn Hansen giftust leygardagin**

Leygardagin giftist ein av okkara fremstu vinnulívsmonnum, Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking.

Meinhard og konan, Fríðunn (fødd Hansen), hava livað saman í fleiri ár og eiga fimm børn. Tað yngsta er nakrar mánaðir, og tað elsta er 11 ár.

Tað var Jógvan Fríðriksson, prestur, sum gifti tey bæði í Fríðrikskirkjuni á Toftum.

Eini 300-350 fólk vóru á brúdleypsveitsluni, sum stóð á Hotel Føroyum.

Meinhard er sonur Jørgen og Josefinu Jacobsen á Toftum, og Fríðunn er dóttir Kristin og Marjun Hansen á Argjum.

Nýgiftu hjúnini búgva í Traðarbrekku í Havn.